# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Spennandi filmsverkætlan

Eitt danskt filmsfelag fór herfyri undir eina spennandi filmsverkætlan saman við føroyingum. Hon snýr seg um at gera eina ella fleiri DVD filmar burtur úr gomlum filmum, sum eru tiknir upp í Føroyum so langt aftur filmur hevur verið til.

Tað er eitt felag undir Nordisk Film, ið kallast Substanz, sum hevur tikið stig til hesa filmsverkætlan, har gerandisupplivingar hjá føroyingum skulu lýsa tey seinastu 100 árini av føroyskari søgu. Gerandisupplivingar hjá føroyingum skulu savnast saman og gerast til film.

Fyrsta stigið í verkætlanini, sum fór av bakkastokki á kunnandi fundi í Müllers pakkhúsi fyrr í ár, er at fáa allar føroyingar um at kanna eftir, um teir hava gomul filmsklipp liggjandi. Ella um teir kenna onkran, sum man hava okkurt áhugaverd filmstilfar liggjandi. Eisini at kanna øll hugsandi arkiv úti sum heima, sum goyma filmar.

Stigtakarin til hesa ætlan, Troels Uhrbrand Rasmussen segði við Rás2 í vikuni, at filmsverkætlanin hevur fingið eina flúgvandi byrjan. Tað vísir seg nevniliga, at føroyingar hava tikið sera væl ímóti áheitanini at finna fram gamlar filmar. At hjálpa sær hevur hann fingið føroyingar í Danmark og Føroyum. Eik grunnurin stuðlar verkætlanini fíggjarliga.

Tað hevur eydnast at fáa staðfest ikki færri enn 40 dokumentariskar filmar í donskum arkivum, har tann elsti er frá 1907. Innihaldið er alt frá kongavitjan til landbúnað og útbygging av teimum nýggju Føroyum. Ì Føroyum eru tað fleiri persónar, sum hava gjørt vart við seg og sum liggja inni við gomlum upptøkum. Allir filmar verða so spældir yvir á DVD og fáa eigararnir DVD kopi umframt originalin aftur.

Vit kunnu bert fegnast um, at henda verkætlan hevur sæð dagsins ljós, tí her er talan um part av mentan og samleika okkara, ið ikki skal liggja goymt undir vaðingini ella í fjaldum arkivum men sum eigur at síggja dagsins ljós og verða partur av nútíðar Føroyum. Eisini kundi hetta verið við til at eggja okkara egnu filmsfólkum til at farið undir líknandi stig. Herfyri vísti løgtingskvinna í lesarabrævi á, at tað er spell, at slíkt stig skal vera tikið í útlandinum og ikki av okkum sjálvum. Hon eftirlýsti størri stuðul til føroyska filmsframleiðslu. Tað kunnu vit bara vera samd við hana í, men tað eina eigur so ikki at útiloka hitt.

Sum skilst hevur danska filmsfelagið "specialiserað" seg í at gera søguligar filmar úr upprunatilfari tvs. gomlum filmum. At so Eik grunnurin hevur mett hetta at vera vert at stuðla kunnu vit bara fegnast um. Miðlahúsið hevur seinastu ólavsøkurnar víst gamlar filmar úr Føroyum. Verður høvi hjá okkum at vísa úrslitið av umrøddu verkætlan leggja vit fegin høli okkara til og hví ikki just á ólavsøku, tá mentan og samleiki eru so frammaliga á breddanum.

**Sosialurin**

## Hvat skal stjórnarskipanarlógin brúkast til?



**HELGI ABRAHAMSEN**
skrivari
Sambandsflokkurin

Tað frættist nú um dagarnar, at formansskapurin í Løgtinginum skal gera av, um eitt uppskot frá Sjálvstýrisflokkinum skal burturvísast frá tinginum. Orsøkin sigst vera, at tá Løgtingsskrivstovan kannaði uppskotið, kom fram, at ymiskt í uppskotinum ikki var í samsvar við stýrisskipanarlógina.

Soleiðis er okkara politiska skipan uppbygd. Vit hava eina grundlóg, sum er galdandi fyri alt ríkið, og undir henni er heimastýrislógin, sum í samsvari við grundlógina, gevur føroyska heimastýrinum ávísar heimildir. Undir heimastýrislógini er stýrisskipanarlógin og undir stýrisskipanarlógini eru vanligar løgtingslógir (tær sum verða vístar burtur úr tinginum, um tær ikki samsvara við stýrisskipanarlógina). Og fara vit so longur niður í skipanini, so kunnu landsstýrismenn gera kunngerðir, við heimild í løgtingslógum o.s.fr.

**Stjórnarskipanarlógin**

Tá fullveldislandsstýrið í 1998 byrjaði at fyrireika loysingina frá Danmark, varð ein grundlógarnevnd sett at gera føroyska grundlóg. Lógin skuldi koma ístaðin fyri donsku grundlógina, og skuldi sostatt vera ovasta lógin fyri tað nýggja føroyska ríkið.

Men sum vit øll vita, náddi landsstýrið ikki á mál við fullveldisætlanini, men grundlógarnevndin helt tó fram við sínum arbeiði. Nevndin broytti navn til "Stjórnarskipanarnevndin", og lógin fekk navnið "Stjórnarskipanarlógin". Semja var ikki um, hvat lógin skuldi brúkast til. Teir loysingarsinnaðu flokkarnir hildu fast við, at lógin skuldi vera ein føroysk grundlóg, meðan Sambandsflokkurin segði, at hon skuldi vera ein nýggj stýrisskipanarlóg (undir donsku grundlógini og Heimastýrislógini).

**Fólkaatkvøða um hvat ?**

Nú Tjóðveldi og Miðflokkurin eru komin í landsstýrið, saman við Javnaðarflokkinum, hava teir bustað støvið av hesum gamla uppskotinum um stjórnarskipanarlóg, og hava skrivað í samgonguskjalið, at fólkaatkvøða skal verða um lógina í 2010. Men hvar skal lógin vera í skipanini?

Um vit skulu halda fram í ríkisfelagsskapinum við Danmark, vilja danir uttan iva krevja, at alt okkara lógarverk samsvarar við donsku grundlógina, sum framhaldandi verður ovasta lógin fyri alt ríkið. Tað stendur beinleiðis í grundlógini, at hon er galdandi fyri "alle dele af Danmarks Rige". Tað vil siga, at føroyska stjórnarskipanarlógin má vera undir (og tí eisini í samsvari við) donsku grundlógina. Men tað fara Tjóðveldi og Miðflokkurin neyvan at góðtaka.

Spurningurin um vit skulu hava danska ella føroyska grundlóg verður tí í seinasta enda ein spurningur um samband ella loysing. Vit kunnu ikki vera partur av danska ríkinum, uttan at vera undir donsku grundlógini.

**Einki fæst at vita**

Formaður Sambandsfloksins setti í farnu viku løgmanni ein munnligan fyrispurning í løgtinginum um hesi viðurskifti. Kaj Leo Johannesen spurdi millum annað, um stjórnarskipanarlógin fer at hava somu rættarligu støðu sum danska grundlógin hevur í dag, ella um hon verður ein lóg, sum verður undir donsku grundlógini. Men løgmaður gav ikki nakað greitt svar. Hann hevur jú fyri einum mánað síðani sent eitt persónligt bræv til allar føroyingar, har hann ávaraði ímóti at "spæla hasard" við ríkisfelagsskapinum. Tí kann hann ikki nú siga, at hann sjálvur vil seta eina føroyska grundlóg í gildi ístaðin fyri ta donsku. Men samstundis hevur hann nakrar samgongupartnarar, sum ikki góðtaka at skula vera undir donsku grundlógini. – So hvat skal hann svara ?

**2010 nærkast**

Í 2010 skulu vit øll á fólkaatkvøðu um stjórnarskipanarlógina. Vónandi fáa vit at vita innan ta tíð, hvat tað er, sum vit skulu atkvøða um. Verður tað ein føroysk grundlóg, sum er yvir øllum øðrum lógum, ið galda her á landi, ella verður tað ein lóg, sum verður undir- og samsvarar við donsku grundlógina ? Verður tað samband ella verður tað loysing ?

- Nú vit tosa um at spæla hasard...

## Verður frálíka samgonguskjalið innan mentan og tónleikin umsett til veruleika?

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



**- ongin ivi er um, at tónleikurin hevur sett sær stórar vónir, sum vónandi verða settar í verk**

Tá eg sat og setti meg inn í hetta samgonguskjalið, sum samgongan hevur sett út í kortið, kundi eg neyvan annað enn frøast, tí nú skal eitthvørt henda innan føroyska mentunarøkið.

Men, fer tað nú tað?

Sum so mangan áður, so er nógv tosað og lovað, men er nøkur meining og nakar vilji at fremja neyðugu broytingarnar?

Drukna øll onnur mentunarlig átøk í útbúgvingarligum ætlanum – ella hvat skulu vit vænta okkum?

Tað er fínt við útbúgvingingum, men vit mugu ansa eftir, at sjálv mentanin og samleikin ikki ikki fara fyri bakka.

Alt snýr seg jú um okkara felags samleika, og tí má alt innan mentanarøkið fara upp í eina hægri eind, so vit ikki bara kasta okkum yvir eina ætlan, men taka atlit at øllum metanarliga økinum.

Neyðugt er neyvan við fleiri orðum – hvat kunnu vit vænta okkum?

Gevið nú tónleikinum ein virðiligan kjans!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.